STUDNI
Student Grant Fund

Umsóknarblað til barnsburðarfarloyvi

Persónsupplýsingar (Nýtið kúlupenn og spjaldrastavir)

P-tal -	Teldupostadressa	Telefon/fartelefon
Øll fornøvn	Eftirnavn	
Gøta / nr.	Postnr.	Býur / bygd

Søkt verður um barnsburðarfarloyvi

Farloyvi frá	Farloyvi til	Sett at eiga (termin)
dag. mán. ár	dag. mán. ár	dag. mán. ár

Farloyvi fulla tíð ☐ ella farloyvi parttíð ☐

Viðmerkingar

Váttan frá skúla / lærustovni

Undirskrift og stempul frá skúla / lærustovni

Váttan

Eg vátti undir trúnaðartreytum, at tær givnu upplýsingar eru rættar.

Dagfesting

Undirskrift umsøkjarans

Sí vegleiðing á baksíðuni

Gev gætur: Tá byrjað verður aftur í skúla eftir barnburð, skal skjalið "**Endalig fráboðan um barnsburðburðarfarloyvi**" latast Studna.

Studni – Hoyvíksvegur 72 – Postrúm 9 – FO - 110 Tórshavn
Heimasíða: www.studni.fo - **T-postur:** studni@studni.fo

Seinast broytt: 01.09.21

Vegleiðing viðvíkjandi barnsburðarfarloyvi til lesandi

Í stuttum kann sigast um skipanina:

- stuðul verður veittur í sambandi við barnsburð og ættleiðing.
- stuðul verður í mesta lagi veittur í 11 mánaðir.
- stuðulin er tann sami, sum tann lesandi vanliga fær.
- bæði foreldrini kunnu ikki samstundis fáa barnsburðarfarloyvisstuðul úr skipanini.
- tann lesandi skal búgva saman við barninum fyri at fáa barnsburðarfarloyvisstuðulin.

Harafturat er ásett:

- at stuðulin vanliga verður veittur frá terminsdagfesting, men kann veitast kvinnum 1 mánað áðrenn og í serstøkum førum 2 mánaðir fyri termin.
- stuðulin kann eisini veitast frá upp til 3 mánaðir eftir føðing.
- stuðulin er óheftur av teimum rættindum, sum vunnin eru úr øðrum skipanum.
- rætturin til stuðulin kann verða varðveittur, um tann lesandi skiftir útbúgving í barnsburðarfarloyvistíðini treytað av, at tann lesandi er innskrivaður á eini útbúgving.
- um barnsburður ella ættleiðing fer fram áðrenn útbúgvingin byrjar, hevur tann lesandi rætt til at fáa barnburðarfarloyvisstuðul tað tíðarskeiði, sum eftir er av teimum 11 mánaðunum.
- um barn/fostur doyr, verður rætturin til barnsburðarfarloyvisstuðulin til kvinnuna varðveittur, tá ið føðing er farin fram.

Barnsburðarfarloyvisskipanin gevur báðum foreldrum somu rættindi. Bæði tann lesandi móðirin og lesandi faðirin kunnu fara í farloyvi, treytað av, at tey ikki eru í barnsburðarfarloyvisskipanini samstundis. Við øðrum orðum fylgir barnsburðarfarloyvisstuðulin barninum uttan mun til, um tað er móðirin ella faðirin, ið velur at fara í farloyvi. Foreldrini avgera sjálv, hvussu tey býta farloyvið ímillum sín.

Mannagongd

Lesandi kunnu í dag fáa útbúgvingarstuðul í upp til eitt ár út um ásettu lestrartíðina. Ein lesandi kann t.d. fáa stuðul í 5 ár til eina 4 ára langa útbúgving. Fær ella ættleiðir lesandi eitt barn í útbúgvingartíðini og tekur fult barnsburðarfarloyvi, gevur barnsburðarfarloyvisskipanin tí lesandi møguleika fyri at fáa útbúgvingarstuðul í upp til 6 ár til eina 4 ára langa útbúgving. Velur tann lesandi hinvegin t.d. at lesa hálva tíð í eitt ár, er møguleiki at fáa stuðul í upp til 5½ ár til eina 4 ára langa útbúgving. Velur tann lesandi at taka barnsburðarfarloyvi í ½ ár, er eisini møguleiki at fáa stuðul í upp til 5½ ár til eina 4 ára langa útbúgving. Við øðrum orðum verður farloyvistíðin løgd afturat loyvdu stuðulstíðini.

Á skjalinum "Umsóknarblað til barnsburðarfarloyvi" skal tann lesandi saman við lærustovninum boða Studna frá, tá hann fer í barnsburðarfarloyvi. Lærustovnurin skal eisini beinanvegin, tá tann lesandi byrjar aftur á lærustovninum, á skjalinum "Endalig fráboðan um barnsburðarfarloyvi", boða frá , at tann lesandi er byrjaður aftur á lærustovninum, og um burðarfarloyvið hevur verið fult ella partvís. Um farloyvi hevur verið partvís skal skúlin boða frá í hvønn mun tann lesandi hevur verið í farloyvi, teir mánaðirnar, viðkomandi hevur verið í farloyvi t.d. 17 av 34 tímum ella 12 av 30 tímum. Studni tekur síðani støðu til, hvussu nógvir mánaðir kunnu leggjast afturat stuðulstíðini hjá tí lesandi. Talan kann vera um 1-11 mánaðir.